# Fjórða árið við seyðasýning í Skálavík

**Næstsíðsta leygadag var seyðasýning í Skálavík, har menn úr eysturbygdunum og øðrum bygdum við komu saman at sýna fram seyð og til hugnaligar samveru**

SEYÐASÝNING

Aftur í ár var seyðasýning í Skálavík. Hetta er fjórða árið, at sýning er í bygdini, og munnu tað verða umstøðurnar, ið gera tað, at hon er her á hvørjum ári, heldur Palli Dalsgaard í Skálavík.

Hann greiðir frá, at tað er ein stuttleiki at síggja, hvussu væl menn ganga upp í hetta tiltakið.

Lítið man vera at ivast í, at fyri seyðabrúkið er hetta ein stórur bati. Men tað er ikki einans seyðurin, ið hevur fyrimunin av hesum tiltaki, heldur Palli Dalsgaard.

Tað sosiala í hesum hevur eisini sín stóra týdning.



Sýnsmenninir vóru fýra í tali. Teir eru frá vinstru: Olaf í Garði, Poul Samuelsen, Eddie joensen og Dávur Emil Hansen. Fimti maðurin á myndini eru Eynar Martin Kjærbo, hann er ikki sýnsmaður



*Hesir báðir vóru til seyðasýningina ár 2002. Teir síggja út til at hava annða at tosa um enn seyð. Tað er kanska einki at siga til, báðir hava siglt sum yvir menn heila sítt lív. Teir eru: Hans Martin Viderø úr Húsavík og Magnus Zachariasen av Sandi*

Menn koma saman úr øllum eysturbygdunum, og øðrum bygdum við. Menn, ið annars lítið og einki hava við hvønn annan at gera í tí dagliga hittast og kunnu tosa saman um mangt og hvat. Men tað er ikki einans um seyð, tosað verður, nei, tað er so eiðasørt, greiðir Palli Dalsgaard frá.

Mong ymisk mál eru uppi og venda ta tíðina, seyðasýningin varir.

– Eg havi nevnt tað fyrr. Tað er tann ungi bóndin her í bygdinin, Eynar Martin Kjærbo, ið er upphavsmaðurin til hetta tiltakið. Hann gongur upp í tað við lív og sál –og hevur fingið fleiri at taka undir ivð sær.

Teir, sum stíla fyri og sýnsmenninir eiga tøkk uppiborna fyri sítt arbeiði. Aftaná, tá liðugt var, var matur at fáa á Keldu fyri øll. Tær kvinnurnar, ið har hava gjørt eitt sórt arbeiði, eiga eisini eina stóra tøkk uppiborna. Kvinnan setur sín sermerkta dám á alt tað, maðurin tekst við, heldur Palli Dalsgaard. Á Keldu vóru steypini handað teimum, sum høvdu bestu seyðirnar.

Vit fingu nógv og gott at eta, sungu nakrar sangir. Tá var tíð til frið at venda, ein langur og hugnaligur dagur var at enda komin, greiðir Palli Dalsgaard frá.





NÚ KEMUR

*... greið tala!*
**Kánus**

Hósdagin 17. november kemur Kánus í handlarnar.

Stuttligasta spurningaspælið, sum er komið á føroyskum.
Undirhald og spenningur við spurningum um alla ta vitan, sum goymir seg í okkara dagliga máli.

Statt ikki sum Kánus, men keyp spælið nú!
Kánus fæst í hesum handlum:

**550,- kr.**

Keypssamtøkurnar kring landið
Bókasølan og Griffilin í SMS
BR Leikur
Thomas Dam á Hálsi
H. N. Jacobsens Bókhandil
Hjalmar Jacobsens Bókhandil
Leikalund, Klaksvík
Alfa Bókhandli, Klaksvík
Leikabúðin, Saltangará
Fa. Ellen Dahl, Vágur
Karl Jespersen, Tvøroyri

SISERO 351800

ATLANTIC AIRWAYS www.fk.fo REYNI SERVICE SKIPAFELAGIÐ





**KAJ2**

**EITT KRÍGGI ER MILLUM HESAR BÁÐAR MYNDIRNAR**
av skiparanum Kaj, og tað er hetta kríggj, seinni heimsbardagi, annað bindið í ævisøguni um Kaj snýr seg. Seinni heimsbardagi var eisini ein gulltíð fyri teir sum sluppu at sigla. Hvussu nógv fortjentu teir? Eitt yvirlit er aftast í bókini yvir inntøkurnar hjá hvørjum einstøkum manni, sum sigldi hjá Kjølbro, enntá túr fyri túr undir krígnum.

*Bíleggjast kann eisini beinleiðis gjøgnum heimasíðuna www.hellurnar.com.*

FØROYAPRENT · TEL. 314 555

**Bíleggingarseðil**

Undirritaði ynskir at fáa annað bindið, **"Kaj 2 – ein dokumentarisk ævisøga"** sendandi við postinum útgávudagin, sum verður seinnu helvt av oktober. Bókin er 440 síður og kostar 399,- kr. í sølubúðunum. Til ber at keypa bæði bindini gjøgnum hendan bíleggingarseðil beinleiðis frá forlagnum fyri 349 krónur hvørt, tá er postgjald íroknað.




Verður sent ópostað (móttakarin rindar postgjaldið)

330

Eg bíleggi: ☐ **KAJ** _____ stk. *fyrsta bind* ☐ **KAJ2** _____ stk. *annað bind*

Navn:

Bústaður:

Postnummar:

Bygd/býur:

*Undirskrift*

**Forlagið Hellurnar**
v/Jústinus Leivsson Eidesgaard
Ovaragøta 1, 188 Hoyvík.
Tel. 322800 ella 223143
Teldupostur: justinus@post.olivant.fo
www.hellurnar.com